## Vilja hava meiri tvøst

Sambært teimum serligu reglunum um rættindini hjá upprunafólki hava grønlendingar rætt til at veiða so mikið av hvali á hvørjum ári, at tað gevur 670 tons av tvøsti. Men sum er sleppa teir bara at veiða tað, sum svarar til 540 tons, og tað eru teir ikki nøgdir við. Tí fer Danmark at reisa málið vegna Grønland á fundinum hjá hvalaveiðinevndini í næstu viku. Málið er at fáa loyvi at skjóta so mikið av hvali afturat, at tað gevur 130 tons av tvøsti.

## Vænta skattalætta

Í seinastuni hava danskir politikarar keglast at kalla dagliga um skatt og skattalætta, og nú vísir ein meiningakanning, at fleiri danir vænta sær skattalætta burtur úr tí nógva tosinum. Enn eru tað kortini bara 27 prosent, sum vænta sær minni skatt, og hóast tað er munandi fleiri enn fyri einum hálvum ári síðani, eru tað framvegis 68 prosent, sum ikki vænta sær skattalætta. Í stjórnini er Vinstri ímóti skattalætta, men tey konservativu siga ja.

# Vísindalig ráðstevna um heilsu

**Í gjár byrjaði ein 5-daga long vísindalig ráðstevna í Norðurlandahúsinum. Evnið er, hvussu umhvørvið í móðurlívi ávirkar heilsuna seinni í lívinum**

RÁÐSTEVNA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sjálvt um arvurin er tann sami, kunnu ymisk umhvørvi í móðurlívi hava við sær varandi broytingar í heilsustøðuni. Dømi um hetta eru dálkandi evni, men hinvegin eru eisini evni, sum kunnu virka gagnlig, til dømis fitisýrur. Umráðið er ógvuliga viðfevnt og hevur stóran og vaksandi áhuga millum granskarar.

Hetta sigur Pál Weihe, yvirlækni og granskarin, í sambandi við eina altjóða vísindaliga ráðstevnu, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum í hesum døgum.

Pál Weihe vísir á, at tað hevur eydnast at fáa nógvar vælkendar granskarar at koma til ráðstevnuna. Teir fara at greiða frá egnum granskingarúrslitium og fáa eisini høvi at kjakast við starvsfelagar um granskingarúrslit.

Luttakaratalið er á leið 200, og meginparturin kemur úr londum uttan fyri Norðanlond.

Vísindaliga ráðstevnan byrjaði í gjár 16 og heldur fram til hósdagin.



*200 fólk, har meginparturin eru granskarar, luttaka í hesum døgum á vísindaligari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Løgmaður á granskingarráðstevnuni:

# - Havumhvørvið hevur stóran týdning

**Verður havið nýtt sum køstur, er tað samfeløg sum okkara, ið fara at kenna sviðan av tí, segði Jóannes Eidesgaard, tá í gjár setti eina granskingarráðstevnu í Norðurlandahúsinum**

RÁÐSTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, er staddur uttanlands, og tí var tað løgmaður, sum í gjár bjóðaði vælkomin á granskingarráðstevnuni um umhvørvisliga ávirkan á heilsu, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum frá sunnudegnum til hósdagin.

Líka síðani ídnaðarkollveltingina hava londini í Europa dálkað illa, og hendan dálkingin er ikki blivin minni eftir at kjarnorkulondini byrjaðu at royndarspreingja sínar kjarnorkubumbur, vísti løgmaður á.

Í sama andadrátti nevndi hann eisini vandan fyri, at golfstreynmurin viknar og tær avleiðingar tað møguliga kann hava á fiskastovnarnar. Eisini nam hann við grindahvalin og blýggið, ið hesin hevur í sær, og sum vit eisini fáa í okkum við at eta grind.

- Grindahvalur hevur verið hildin til við føroysku strendurnar í øldir og er býttur til økið eftir serligum býtingarmynstri, so eingin verður við sviðusoð, segði løgmaður.

Av og á leggja djóraverndarfelagsskapir trýst á okkum fyri at fáa okkum at gevast við grindadrápi, men løgmaður slerdi fast, at vit á ongan hátt ætla at eftirlíka hesum.

- Tað er fyri okkum ein prinsippsak at hava loyvi at gagnnýta havsins tilfeingi á ein skilagóðan og burðardyggan hátt, segði Jóannes Eidesgaard.

Tað er tí eisini av stórum týdningi, at farið verður so væl um umhvørvið sum tilber, tí verður havið nýtt sum køstur, verða tað fyrst og fremst samfeløg sum okkara, ið fara at merkja avleiðingarnar, segði løgmaður millum annað, tá hann setti granskingarráðstevnuna í Norðurlandahúsinum sunnudagin.



*Í gjár byrjaði ein 5-daga long, læknavísindalig ráðstevna í Norðurlandahúsinum. Pál Weihe, yvirlækni og granskari, er ein av stigtakarunum til ráðstevnuna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*